LANDFUNDUR SAMBANDSFLOKSINS

# Sambandsmenn ósamdir um samband

**Sambandsmenn eru ójavnir á máli um, hvussu gjaldast skal fyri sambandið. Um føroysku sundini væl at merkja**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Ivan Johannesen, vágamaður á sambandsfundi, helt tað vera púra skeivt at gjaldast skal fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin. Tað helt Alfred Olsen, toftamaður á sama fundi, ikki.

Eins og onnur vágafók, sum høvdu orðið á landsfundi Sambandsfloksins, beyð Ivan Johannesen fundarfólkinum vælkomin vestur í Vágar.

Men hann helt ikki, at tað var rætt, at gjaldast skuldi fyri at koyra undir Sundinum.

– Eg havi verið við til at gjalda fyri vegakervið, brýr og tunlar um alt landið. Men nú eg skal brúka tað sjálvur, skal eg gjalda fyri tað. Tað vil eg ikki góðtaka, segði Ivan Johannesen.

Tað fekk Alfred Olsen, løgtingsmann í Eysturoy, at taka orðið. Hann minti Ivan á tað, hann júst hevði sagt um ferðsluna um Leirvíksfjørð, samstundis sum hann fegnaðist um, at nú var prísurin fyri ávísar avsláttarskipanir undir Vestmannsundi júst lækkaður til helvtarprís av vanliga ferðaseðlinum. Tað átti Ivan heldur at fegnast um, helt hann. Tí um ikki so var, kundi skjótt hent, at eisini um Vestmannasund var sama skilið, sum tað er á Leirvíksfirði í dag.



*Alfred Olsen, næstformaður i Sambandsflokkinum, er ósamdur við Ivani Johannesen í, at tað skal vera ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Slitið ov nógv og skaðin ov stórur

**Sambandsflokkurin skuldi bara haldast uttan fyri ávirkan fyri ein hvønn prís, staðfesti Lisbeth Petersen í formnansrøðu síni á landsfundi Sambandsfloksins í Sørvági um vikuskiftið**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*



*Reypið um fullveldi og yvirtøkur er við at tagna, og tað má ongantíð koma framaftur, sigur Lisbeth L. Petersen*

**Sørvági:**
Reypið um fullveldi og yvirtøkur er við at tagna, og tað má ongantíð koma framaftur, segði Lisbeth L. Petersen, formaður Sambandsfloksins í røðu síni til landsfund Sambandsfloksins.

Hon ivaðist álvarsliga í, hvussu fíggjarstøðan í landskassanum í grundini er. Helt tosið frá samgongunin í stóran mun vera reyp.

Blokkstuðulin varð eisini tikin fram og víst á tað, eftir Sambandsfloksins meting, skeiva í, at blokkstuðulin var avtikin. Tí tær sparingar, samgongan boðar frá, helt hon fara at muna lítið sum mótvekt móti tí minkaða blokkstuðulinum.

Sambandsflokkurinn vil taka ES spurningin upp. Hetta er ein livandi felagsskapur, sum summir flokkar tykjast ræðast. Men Sambandsflokkurin fer at halda lív í kjakinum, staðfesti Lisbeth L. Petersen.

Menn hinvegin var ikki so nógv væntandi frá samgonguni, helt hon, tí har varð bara keklast og klandrast innanveggja. Eingin fær verið saman, og eingin torir at fara sundur. Til tess er maktin ov góð at fara frá.

Tær fólkaatkvøður,sum samgongan hevur boðað frá, eru farnar, staðfesti hon.

Tað kostar at reka vælferðarsamfelagið, ásannar Sambandsflokkurin. Tí vildi flokkurin ikki skerja blokkstuðulin og loysa frá ríkisfelagsskapinum. Vit halda heilt greitt við hann.

– Vit vingla ikki í hesum spurningi, segði Lisbeth L, Peteren.

Sambandsflokkurin skal altíð vera flokkurin, fólk kunnu líta á. Vit skulu halda tey lyfti, vit geva, segði formaðurin millum annað í røðu síni.

# Ivasamt um samgongan eigur løn

**Ivan Johannesen helt tað vera løgið, um samgongan hevði fingið løn hetta seinasta árið, tá teir núgstaðni eru farnir at tosa um at fara í arbeiðsklæðini**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*



*Ivan Johannesen ivast í, um samgongan eigur at fáa nakra løn. Sambært Høgna Hoydal eru hon enn ikki komin í arbeiðsklæðini, tíansheldur farin til arbeiðis, sigur hann*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Vit nærkast teirri støðuni, at vit eiga ikki fyri løn til almenna fólkið, væntaði fyrrverandi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Ivan Johannesen.

Hann metti seg kenna støðuna aftur, tá hann varð noyddur at siga frá, at nú var ikki ráð til almennar lønir.

Hann vísti sum dømi, at nú er ikki ráð at hava skip siglandi um Leirvíksfjørð. Tað boðar iki frá góðum, helt hann.

Men tað er ikki alt, segði Ivan Johannesen og legði beint i fiskidagskipanina.

Har er galið, so tað stendur eftir. Skilið er ringt, og tá nýggj tilráðing kemur í heyst, skulu tit vera vís í, at tað skal aftur skerjast. Tí har er eingin sum helst stýring á, segði hann

Hann segði, at tað, sum nú gongur fyri seg, er ikki eftir teirri ætlan, sum løgd varð í viðtøkuna í 1996. Hetta er sum best ber til, og tað fara nógvir at kenna sviðan av, segði Ivan Johannesen.

## Floksleiðsl-an heldur fram

**Lisbeth L. Petersen og Alfred Olsen manna framvegis formansskapin í Sambandsflokkinum**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Landsfundurin hjá Sambandsflokkinum, sum hildin varð í Sørvági um vikuskiftið, valdi at lata formansskapin í flokkinum halda fram. Stutt og greitt, tí einki annað uppskot var.

Landsfundurin byrjaði við aðalfundi Sambandsfloksins fríggjakvøldið. Har vóru frágreiðingar frá floksskrivara, kassameistara og formanni í landsnevnd floksins lagdar fram.

Veruligt orðaskifti um stór politisk mál var í grundini ikki fyrr enn leygardagin.

# Eingin visión í samgonguni

**Samgongan hevur onga heildarætlan, men koyrir bara upp á luftkastellur, segði Johan Dahl, tingmaður, á landsfundi Sambandsfloksins**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Eingin inntøkuskapandi visión er í samgonguni. Har liggur alt steindeytt og fantaserar um fullveldi.

Soleiðis lýsti sambandstingmaðurin í Suðuroy politisku støðuna í samgonguni.

Hann fýltist á, at ov lítið varð hugsað um fiskivinnuna í landinum, tí fiskivinnan er í hvussu er tað, sum ber okkum uppi. Umframt blokkstuðulin, tók hann aftur í aftur.

– Tað nyttar lítið at útbúgva eina rúgvu av studentum, sum fara uttanlands at læra víðari og so ikki koma aftur.

Ein fiskivinnuskúla hava vit, men hann verður líkasum gloymdur í øllum hesum. Verður ikki tikið annað skinn um bak, kann skjótt enda galið, fryktaði Johan Dahl fyri.

Fundurin verður klokkan átta í kvøld tann 1. apríl.

# Raðfestingin verður gjørd í Føroyum

**Í kjakinum um sjúkrahúsverkið varð millum annað komið inn á peninganýtsluna í sjúkrahúsverkinum**

SAMBANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Føroyingar avgera púra einsamallir, hvat vit brúka peningin, vit fáa í blokkstuðuli, til. Tað staðfesti Lisberth Petersen á landsfundi Sambandsfloksins.

Hildið varð fram á landsfundi Sambandsfloksins, at raðfestingarnar í heilsuverkinum hava eitt sindur av slagsíðu.

Ymsar meiningar eru um, hvørt tað er rætt at brúka peningin til lønir, ella um hann skuldi verið brúktur til íløgur og viðlíkahald. Og so er skjótt at fáa bent orðaskiftið tann vegin, at pengarnir eru markaðir til ávísar partar í eitt nú sjúkrahúsinum.

Men so er ikki, segði Lisbeth L. Petersen. Hon segði við støði í fyrilestri hjá Bent Klinte, fyrrverandi ríkisumboðsmanni, at tað eru bara føroyingar sjálvur, sum gera av, hvat peningurin frá blokkstuðlinum verður brúktur til.

– Tað er bara, um føroyingar finna upp á taka av eitthvørt, at danir fara at blanda seg uppí, segði Lisbeth L. Petersen.

Ansgar Hansen, kalskvíkingur á sambandsfundi, spurdi beinleiðis, um Klaksvíkar sjúkrahús eigur nakran vin í Sambandsflokkinum, svaraði Lisbeth Petersen stutt og greitt: »Ja«.

Hon vísti á, at tað eisini í framtíðini fara at verða trý sjúkrahús í føroyska heilsuverkinum. Tað er breið politisk semja um tað.

Tað er nógv størri samstarvsvilji millum sjúkrahúsini, bæði hjá starvsfólki og politikarum, í dag, enn tað var fyri bara fáum árum síðan.

Petur Ellefsen, sum hevði innleggið um heilsuverkið á landsfundinum, tók aftur í spurningin um, hvørt Klaksvíkar Sjúkrahús átti nakran vin í Sambandsflokkinum við at siga, at tað mangan tókstist soleiðis, at annaðhvørt ert tú vinur við Klaskvíkar sjúkrahús ella ikki.

– Tí er gott at eiga eina sum Lisbeth, sum klárar at vera vinur við bæði Klaksvíkar Sjúkrahús og eitt nú Landssjúkrahúsið, segði hann.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Judith Ludvig til Norðurlandahúsið

17. mars bleiv Judith Ludvig sett í starv sum leiðari á Kafeteria í Norðurlandahúsinum. Judith, ið er 32 ára gomul, er fødd og uppvaksin í Famien og kom til Havnar í 1997. Hon lærdi til cafeteria- kantinuassistent í Perluni í SMS frá 1998 til 2000 og til viðskerafrúgv á Hotel Hafnia frá 2000-2003. Uppgávan hjá leiðaranum er at hava ábyrgd av dagliga rakstrinum, at ráðleggja og menna kafeteriavirksemi í Norðurlandahúsinum. Arbeiðið fatur eisini um ítøkiliga matgerð kundaavgreiðslu og aðrar uppgávur.



## Inger Hansen 65 ár

6. mars fylti Inger Hansen í Havn 65 ár. Inger er fødd og uppvaksin á Abbatrøð í Havn, dóttir Hilmar Danielsen av Hvítanesi og Herdis, F. Nybo, eisini av Hvítanesi. Inger hevur verið virkin innan Frelsunarherin síðan hon var smágenta, har hon hevur verið skóti og skótaleiðari og var ungdómsleiðari í 18 ár. Umframt tað hevur hon havt sunnudagsskúlan í næstan 40 ár. Hon hevur verið kassameistari í Heimaforbundinum hjá Frelsunarherinum síðan 1995. Hon arbeiddi nøkur á hjá Bambus Foto, sum tá helt til í Tróndargøtu og í skóbúðini hjá Demmus í miðbýnum. Hon var eisini dagrøktarmamma í 10 ár.



Inger giftist í 1961 við Denhard Hansen av Toftum og eiga tey børnini Sólvu og Jógvan Páll.

## Dagurin

Apríl
Navnið kemur av latínska orðinum aperire, ið merkir at lata upp, at opinbera, at avdúka ella okkurt tílíkt. Tað sipar til, at hetta er tíðin, tá ið lív kemur í av nýggjum. Hjá okkum er apríl mámaður eisini vártíðin fram um aðrar við gróðri og grøði um allar leiðir. Men til veður er hann eisini skiftandi, og sagt var, at apríl bæði lívgar og drepur. Kavi, sum kundi koma fyri í lembingini, varð róptur lambaspræni.

1. apríl. Hugo, deyður í 1132. Biskupur í Grenoble í Fraklandi. Týkst navn, sum merkir tann skilagóði ella vísi. Sama veðrið sum var fyrsta apríl, skuldi vera síðsta apríl; ein kona helt fyri: Sum hann prílar inn, prílar hann út.

# Vánaligt samstarv í landsstýrismálanevnd

**Formaðurin í landsstýrismálanevndini, Heini O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum, heldur seg vera tiknan av ræði av fólkafloksmanninum Jákupi Mikkelsen. Ósemjan snýr seg um, hvussu kæran um Ågot skal viðgerast. Jákup heldur hinvegin Heina hava misskilt sína uppgávu**

NEVNDARÓSKIL
*Ingi Rasmussen*

– Eg meti, at Jákup Mikkelsen hevur sagt samgonguna upp. Hann hevur kastað saman við Kaj Leo Johannesen í landsstýrismálanevndini, so eg eri settur út á eitt síðuspor.

So avgjørdur er Heini O. Heinesen, formaður í Landsstýrismálanevndini.

Sostatt er vátt komið í reiðrið í týdningarmiklu nevndini hjá løgtinginum, sum skal hava eftirlit við, at landsstýrið umsitur á fullgóðan hátt.

Heini O. Heinesen pástendur, at fólkafloksmaðurin og sambandsmaðurin hava lagt ráð saman ímóti sær, og tað sigur hann seg ikki vilja góðtaka. Hann sigur, at nevndin er partur av politisku kabaluni, sum skuldi ganga upp, tá samgongan var skipað. Og tí noyðist Jákup Mikkelsen at boyggja seg undir, at hann er formaður í nevndini.

## Fyrsta málið

Ósemjan er íkomin av tí fyrsta málinum, sum yvirhøvur er lagt fyri nevndina.

Felagið Línuskip hevur kært eitt mál um fiskirættindini hjá fyrrverandi Ågot, sum nú eitur Jógvan S. Spurningar og skjøl eru farin aftur og fram millum nevndina og landsstýrismannin við fiskivinnumálum. Sum skilst hevur tvídráttur stungið seg upp í nevndini um, hvussu kæran skal viðgerast.

Sambært Heina O. Heinesen hevur Jákup Mikkelsen saman við Kaj Leo Johannesen nú borið so í bandi, at málið verður avgreitt uttan stórvegis hóvasták.

– Eg vil hava hetta málið kannað út í æsir, og eg havi roynt at víst á, at vit áttu at tikið onnur mál um vinnuligan fiskiskap við í viðgerðina. Málið um Ågot er bara eitt av fleiri, men teir siga, at hetta málið skal avgreiðast uttan nakað sum helst, sigur Heini O. Heinesen, ið metir tað sum grovt álitisbrot á seg sum formann.

## Misskilt uppgávu

Jákup Mikkelsen vísir øllum ákærum aftur. Hann sigur tað vera eina grova ákæru ímóti sær og Kaj Leo Johannesen, tá sagt verður, at teir vilja hava málið »avgreitt uttan nakað sum helst«.

– Heini O. Heinesen hevur misskilt sína uppgávu sum formaður, um hann ætlar at føra politikk í landsstýrismálanevndini. Hetta er ikki ein nevnd við politiskum arbeiði. Vit eru settir at hava eftirlit við, at landsstýrismenn umsita rætt eftir lógini, og tá Heini O. Heinesen sigur, at vit eru partir av einari politiskari kabalu, so er tað púra burturvið, tí vit eru fólksins og løgtingsins umboð í hesi nevndini, sigur Jákup Mikkelsen.

## Løgfrøðilig meting

Einasta uppgávan hjá nevndini er at vera ein trygd fyri, at umsitið verður rætt sambært lógini. Og til tað hevur nevndin ein løgfrøðiligan skrivara at hjálpa sær.

– Í málinum um Ågot spyr Felagið Línuskip á hvørjum grundarlagi tilsøgn til fiskiloyvið er givið. Vit skulu kanna, um tað er í samsvari við lógina ella ikki, og vit (Jákup Mikkelsen og Kaj Leo Johannesen, blðm.) hava biðið skrivaran gjørt eina løgfrøðiliga meting av tí út frá nøkrum forkanningum, sigur Jákup Mikkelsen.

Sum skilst er Heini O. Heinesen misnøgdur við, at teir hava noktað fyri at viðgera fleiri onnur mál í somu vending. Men tað hevði verið vónleyst, sigur Jákup Mikkelsen.

– Um vit høvdu drigið øll møgulig onnur mál inn í viðgerðina, hevði tað tikið ævir, áðrenn nøkur niðurstøða spurdist burturúr. Málið hevði verið fullkomiliga gruggað, sigur Jákup Mikkelsen.

Gevur niðurstøðan hjá skrivaranum ein grundaðan illgruna um, at skeivt er farið fram, so fer nevndin sjálvandi víðari við málinum, leggur hann afturat.

## VIÐMERKINGAR

# Barnaansing

**Gerhard Lognberg**
*borgarstjóri/løgtingsmaður*

Eg meti meg at verða noyddan at koma við nøkrum viðmerkingum til tað stríð, ið stóðst av, at eg sjálvur og fleiri við mær tóku orðið á tingi viðvíkjandi mál nr. 79.

Sjálvur segði eg, at Skopunar Kommuna nøktaði tørvin hvat barnaansing viðvíkti.

Her kann eg so siga, at eg tók munnin ov fullan. Tí tað hava verið tíðir, har vit hava verið noydd at skriva undir, sum flest aðrar kommunur. Hetta vit tosa um er í 2002.

Eg kann nevna nakrar kommunur sum hava verið noyddar til tað sama:

Tórshavnar kommuna 4,3 mill.kr.
Sands kommuna 244.000 kr.
Klaksvíkar kommuna 943.000 kr.
Runavíkar kommuna 454.000 kr.
Vágs kommuna 248.000 kr.
Skopunar kommuna 194.000 kr.
Hvalvíkar kommuna 24.000 kr.

Tað tykist mær, at nú skal tú næstan forfylgjast, grundað á at tú torir at siga nakað ímóti tí almenna.

Almannastjórin hevur verið frammi við peikifingrinum. Síðan kemur landsstýrismaðurin Páll á Reynatúgvu sjálvur fram í Útvarp Føroya og tosar um at kanna hvar feilirnir liggja, og metur at hetta má vera feilur hjá kommununum. Og enntá fer so langt at tosa um svik, vælsignaður maður slappa av.

Hatta nýtist Páll á Reynatúgvu ikki at gera burtur úr hesum máli.

Hann var sjálvur borgarstjóri á Sandi í 2002. Har eru 244.000 kr. bókaðar. Men hann hevur sæð sær hetta sum ein politiskan fyrimun, við at leggja soleiðis út. (Harmiligt av einum landsstýrismanni).

So vil eg siga nakað um tað eg bleiv spurdur um av Útvarp Føroya. Har var eg spurdur um hetta við væntandi barnaansing. Har segði eg púra greitt, at vit høvdu undirskrivða, men kundu iki útgreina tað vegna mína tagnarskyldu, bæði sum borgarstjóri og sum limur í Barnaverndarnevndini.

So eg metti, at Almannastovan kundi tosa við meg, so kundu vit fáa tað uppá pláss, tí eg meti Skopunar Kommunu og Almannastovuna hava eitt fyrimyndarligt samstarv. Nettup í tí, sum vit kalla Spælistovan. Har hava fólk frá Almannastovuni gingið upp í arbeiðið við lív og sál.

So Páll á Reynatúgvu, nú tú er so illa mannaður úti í Almannaráðnum, so haldi eg ikki at tú skal stríðast við hetta.

Eisini vil eg siga, at tú ert hjartaliga vælkomin at tosa við meg um tingini.

Annars trúði eg, at landsstýrismaðurin í farloyvi frá kommunalpolitikki, var so heilt ótrúliga heitur fyri at gott samstarv var í millum bygdin, men atlíkavæl altíð klárur at dýrka ósemju.

Annars gleðist eg um, at fokus er sett á millum annað barnaansingina. Har liggur í hvørfall ikki okkara partur eftir í Skopunar kommunu.

Eg kundi ynskt, at vit fingu sett fokus á barnaskúlabygging eisini.